

Íbúðarpallar av hesum slagnum kunnu enda sum bústaður hjá flóttafólkum. Mynd: Prosafe

# Frálandafyritøkur bjóða seg fram til at hýsa flóttafólkum

**Jógvan Hugo Gardar**

26.11.2015 - 16:19

Oljan.fo>

Í Noregi leita kommunurnar nú eftir hósakandi møguleikum til at hýsa teimum flóttafólkunum sum eru komin til landið, umframt tey ein roknar við kunnu koma í 2016.

Nú hava bæði Stavanger Kommune og UDI, stovnurin sum skipar flóttafólkastreymin og tekur avgerðir um hvar flóttafólk skulu vera, um tey ikki verða vend á markinum, fingið tilboð um at brúka íbúðarpallar.

Torstein Nielsen, kreppusamskipari í Stavanger Kommune, váttar fyri Stavanger Aftenblad at tey hava fingið fleiri tilboð um at brúka íbúðarpallar sum oljuvinnan ikki brúkar í løtuni.

Norskar kommunur fyrireika seg til at taka ímóti umleiv 80.000 flóttafólkum, og í fleiri kommunum framvið norsku strondini verður nú arbeitt við at bjóða fram flótandi íbúðarloysnir.

Nielsen sigur at tey umhugsa allar møguleikar, og at íbúðarpallar er eitt gott boð sum eigur at havat við í arbeivnum viðari.

Ein íbúðarpallur kann hava umleið 400 seingjarpláss.Nielsen trýr álíkavæl at íbúðarpallarnir ikki koma at verða brúktir í fyrstu atløgu, tí tað krevur nakað eyka at fáa hetta at bera til.

Hjá UDI vísa tey á at flóttafólkaíbúðir eru eitt tilboð til tey sum hava fingið loyvi til at koma til Noregs, meðan umsókn um uppihald er til viðgerðar, og í hesum tíðarskeiðnum hava tey lov at fervast frítt í Noregi. Tí er neyðugt at finna loysnir sum gera at íbúðarpallarnir liggja soleiðis fyri at lætt er at koma í land og umborð á pallarnar.